# Tingmaður og lærari: Nú má læraraverkfallið fyri løgtingið

*–Hendir onki nú, dugi eg ikki at síggja nakran annan møguleika, enn at tingið kemur upp í, fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, sigur Jógvan á Lakjuni, tingmaður og lærari*

ÁKI BERTHOLDSEN

Í gjáramorgunin vóru enn ongi tekin um, at ein loysn á læraraverkfallinum var í eygsjón, tað nú eru fimm vikur síðani, at teir sáttmálasettu lærararnr løgdu arbeiðið niður.

Og nú heldur Jógvan á Lakjuni, lærari og løgtingsmaður, at vit eru komin hartil, at vit av álvara mugu umhugsa at lata Løgtingið taka málið upp og fáa ein enda á verkfallinum.

– Partarnir tykjast at standa langt frá hvørjum øðrum og tað er ómetaliga trupult at vita, hvat er tað rætta at gera.

– Men hendir onki nú, dugi eg ikki at síggja nakran annan møguleika, enn at Løgtingið leggur uppí og fær ein enda á verkfallinum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Sjálvur er hann tingmaður fyri fólkaflokkin og sostatt eisini limur í samgonguni.

Við hesum er greitt, at hann hellir sama veg sum samgongufelagið hansara, Jákup Sverri Kass úr sjálvstýrisflokkinum, ger í samrøðuni á síðu 9.

Men hann er ikki líka avgjørdur sum sjálvstýrismaðurin og hann fer ikki sjálvur at taka stig til at reisa málið í tinginum.

Hann sigur, at málið hevur verið uppi í samgonguni, men higartil hevur niðurstøðan verið, at løgtingið eigur ikki at leggja seg upp í.

– Men nú eru vit komin hartil, at vit, mugu viðgera málið meiri í samgonguni. sigur hann.

Og eftir hansara tykki eru einastu ráðini, at tingið nú leggur upp í, um ikki trætan verður loyst beinanvegin.

Men hann dylir ikki fyri, at tað verður eisini trupult hjá tinginum at finna eina rímiliga loysn.

–Tað verður ómøguligt at geva Lærarafelagnum viðhald í øllum. Men fyrsta treytin má verða at fáa greiði á, hvussu langt partarnir eru komnir í samráðingunum og, hvat teir eru samdir um.

– Og sjálvandi skulu lærararnir hava tey 6,5 prosentini í lønarhækking, sum øll hini hava fingið.

Jógvan á Lakjuni sigur, at eftir hansara tykki er ein stórur partur av ósemjuni ein tulkingarspurningar um, hvussu nógv tað kostar, sum er sett í verk av nýggju fólkaskúlalógin og um, hvussu nógv eyka arbeiði, hetta hevur álagt lærarunum.

Hann heldur eisini, at tað eigur at bera til at bíða við at seta summar partar av fólkaskúlalógina í verk, sum ikki eru settir í gildi enn. so kann málið takast uppaftur seinni.

Men hann er eisini samdur við teimum politikarum, sum siga, at tað er rættiliga grundleggjandi, at eitt fakfelag nú hevur átikið sær at definera eina lóg, og tað heldur hann er ivasamt.

– Eg havi eisini varhugan av, at tað, sum Fíggjarmálastýrið roynir at trýsta ígjøgnum, er at áseta eitt ársverk hjá lærarunum.

– Hinvegin hava lærararnir ikki viljað staðfest arbeiðstíðina.

– So málið er sera trypult og fløkt og tað eru nógvir spurningar at taka støðu til, sigur Jógvan á Lakjuni.

Men í øllum førum heldur hann, at læraraverkfallið má fáa eina enda nú, tí hann heldur, at tað hevur longu fingið avleiðingar fyri próvtøkurnar at skúlin liggur at kalla lamin í sjálvum endaspurtinum, tá ið mest kemur burturúr undirvísingini.

Les meiri á síðu 9.

*Høgni Hoydal, um „Signar á Brúnni málið“:*

# – Tað eigur at kannast frá byrjan til enda

*-Hevur hann ikki gjørt nakað skeivt, so eigur støðan at verða nullstillað og Signar á Brúnni settur aftur í landsstýrisstarvið sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sum heldur floksfelagin eigur at fáa tað kanning, sum er lovað honum*

JAN MÜLLER

Tá Signar á Brúnni, landsstýrismaður herfyri bað um at verða loystur úr starvinum heitti hann samtíðis á løgmann um at fáa gjørt eina kanning av øllum málinum um játtanina til Sjónvarpið og viðurskiftum í hesum sambandi. Síðani er komið fram, at løgmaður hevur ikki møguleika at skipa eina slíka kanning, men at Landsstýrismálanevndin kann taka stig til eina kanning. Men hesum hevur formaðurin í Landsstýrismálanevndini longu víst aftur. So er bert tann eini møguleikin eftir, og hann er at fáa 13 tingmenn til at heita á tingformannin um skipa fyri eini kanning.

Sosialurin hevur spurt Høgna Hoydal, landsstýrismann, hvat Tjóðveldisflokkurin fer at fyritaka sær í hesum máli, nú flokkurin longu hevur givið Signar á Brúnni sín fulla stuðul til at fáa eina kanning av málinum.

Hann sigur, at tað má bera til at fáa sligið fast, at tað ber til at gera eina kanning í hesum máli av einum óheftum, uttan at málið verður blakað millum løgting og landsstýri.

-Vit mugu fáa hesa kanningina, soleiðis at málið verður lýst til fulnar. Sjálvandi skal man ikki inn at kanna Grannskoðaranevndina, men lat okkum kanna málið frá byrjan til enda bæði út frá einum løgfrøðiligum sjónarmiði og eisini fyri at fáa eina politiska meting. Landsstýrismenn eru bæði undir løgfrøðiligari og politiskari ábyrgd. Vit mugu tí fáa nakað á borðið sum sigur, hvat er hent frá byrjan til enda.

*-Heldur tú sjálvur, at Signar er sekur í teimum ákærum, sum eru reistar móti honum?*

-Signar á Brúnni hevur tikið eina avgerð, sum er sera týdningarmikil fyri, hvussu ikki bara nýggja stýrisskipanarlógin kemur at virka men eisini, hvussu hon verður uppfatað. Signar á Brúnni hevur tikið eina prinsipiella avgerð. Nú stórur ivi er reistur um hetta málið, valdi hann at fara úr sessinum, til málið er kannað til botns. Tað er ein avgerð, sum hevur gjørt, at bæði landsstýri, løgting og veljarin hevur álit á skipanini.

*-Kanst tú liva við, at Signar ikki fær ta kanning, sum hann hevur biðið um?*

-Nei. Eg haldi hann skal hava hasa kanningina.

*-Nú einasti møguleiki tykist at vera fyri slíkari kanning, at 13 tingmenn heita á tingformannin um at fáa eina kanning, kemur Tjóðveldisflokkurin tá at taka seitt slíkt stig?*

-Tað skulu tit spyrja formannin í tingbólkinum um.

Høgni Hoydal heldur sum nevnt tað vera umráðandi at fáa eina kanning av málinum frá byrjan til enda. Hann heldur tað er óheppið, at eitt upplop í fjølmiðlunum ella aðrastaðni skal vera hornasteinurin undir øllum. Men Høgni Hoydal heldur tað var rætt av Signar á Brúnni at taka hasa avgerðina, tí so stórur ivi varð reistur. Og tað er týdningarmikið fyri rættartrygdina og álitið á skipanina, og hann heldur, at Signar stendur sum ein sterkur maður aftaná ta avgerðina.

*-Sær tú fyri tær, at Signar kemur aftur í sessin eftir eina kanning?*

-Tað geri eg. Hevur hann ikki gjørt nakað skeivt, so verður støðan nullstillað. Signar á Brúnni hevur biðið um eina kanning og hann hevur heitt á løgmann um at gera hana, og tað vilja vit í Tjóðveldisflokkinum sjálvandi hava framt so ella so.

Høgni Hoydal heldur tað annars vera rætt, at bæði landsstýrismenn og løgtingið eisini umrøða hini málini, sum Landsgrannskoðarin eisini nemur við.

*-Heldur tú, at aðrir landsstýrismenn, hvørs stýri eisini hava brúkt meira pengar enn játtan hevur verið til, áttu at tikið somu støðu sum eitt nú Signar á Brúnni?*

Signar á Brúnni og Tjóðveldisflokkurin hava viðgjørt málið og í hesum føri helt man tað vera skilabest fyri at ganga á odda í at skapa álit á skipanina og rættartrygdina, at Signar á Brúnni tók hesa avgerð. Hvat aðrir landsstýrismenn velja at taka avleiðingar av er teira avgerð.

Málið um landskassaroknskapirnar kemur til 1. viðgerð á tingi í dag upplýsir tingformaðurin, Finnbogi Ísakson. Hann hevur onga viðmerking til „Signar á Brúnni málið“, men váttar, at 13 tingmenn hava møguleika at biðja tingformannin seta ein kanningarstjóra at kanna málið.

-Fái eg eina slíkan áheitan, so sigur stýrisskipanarlógin, at ein juristur skal setast sum kanningarstjóri. Men hvat hann skal kanna er so upp til teir tingmenn, sum vilja hava eina kanning.


TYRLUTÆNASTAN
HJÁ ATLANTIC AIRWAYS



TYRLUFLÚGVING Á PÁSKUM

Tyrlan flýgur Skírishósdag, sum fríggjadag, flogið verður ikki Langa Fríggjadag

Tyrlan flýgur 2. Páskadag, sum sunnudag, flogið verður ikki 1. Páskadag.

Atlantic Airways
Tlf. 333410 · Fax 333380






# Tørvur á íbúðum til brekað

*Mánadagin kom út álit, sum Javni hevur latið gera um bústaðarviðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum ár 2.000*

EDVARD JOENSEN

Bústaðarviðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum verða viðgjørd í áliti, sum Javni hevur latið gera. Tað er ein arbeiðsbólkur, sum hevur gjørt álitið, sum kom út í gjár. Arbeiðsbólkurin varð settur á heysti 1998.

Í hesum sambandi var lítil samkoma í hølunum hjá Javna, har álitið varð lagt fram.

Jóna Dahl, formaður í Javna, segði, tá hon beyð vælkomin til hesa samkomuna, at endamálið hjá arbeiðsbólkinum hevur verið at finna fram til, hvør hevur ábyrgdina av bústaðartilboðum til brekað fólk í Føroyum. Og ikki minst at finna út av, hvat gjørt kann verða við tann tørv, sum heilt avgjørt er til staðar.

Og at tørvurin er stórur, kemur týðiliga fram í álitinum. Víst verður á, at listin við teimum, sum hava tørv á bústaði, telur heili 193 fólk. Av hesum eru 17, sum hava bráðfeingis tørv fyri neyðini, og roknað verður við, at komandi tvey árini koma 19 aftrat. Hesi eru fólk, hvørs familja, ella tey, sum hava tikið sær av teimum, av einihvørji grund ikki eru tøk meira.

Jóna Dahl sigur, at tað tykist, sum viljin avgjørt er til staðar at gera nakað við málið. Men her, sum so manga aðrastaðni, verður skyldað upp á, at tað mangla pengar.

Jóna Dahl, formaður í Javna, sigur, at álitið er áhugavert, tí tað so greitt vísir á tørvin, samstundis sum víst verður á loysnir, sum kunnu gera nakað munagott við hendan tørvin.

Í arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt álitið, hava sitið umboð fyri Javna, MBF, Føroya Pedagogfelag, Serstovnadeildina undir Almanna- og Heilsumálastýrinum, Tórshavnar Kommunu og Klaksvíkar Kommunu. Diana í Puntabyrgi, sum umboðaði MBF í arbeiðsbólkinum, hevur verið formaður.

*Jóna Dahl, formaður í Javna, sigur, at tað tykist, sum viljin avgjørt er til staðar at gera nakað við málið. Men her, sum so manga aðrastaðni, verður skyldað upp á, at tað mangla pengar*

# Svensk tíðindafólk bilsin av atburðinum hjá Poul Nyrup

*Tey donsku lesarabrøvini ímóti føroyingum eru beinleiðis racistisk, skrivar Expressen*

HERI EYSTURLÍÐ
ÚR STOCKHOLM

Eftir øllum at døma er tann tíð farin, tá ið svenskir journalistar roknaðu viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark sum innanríkismál, ið teir ikki tímdu at skriva um ella viðgera. Síðani bæði svenska útvarpið, Dagens Nyheter, Expressen og Metro fingu sær búføst tíðindafólk í Keypmannahavn, verður tað danska samfelagið granskað í svenskum fjølmiðlum á ein heilt annan hátt enn áður. Og tað er ikki bara rósandi orð, ið svenskir journalistar hava at bera brøðrafólkinum fyri sunnan.

Eitt nú hevur tað loypt kvøkk á svensk tíðindafólk, at ein flokkur sum Dansk Folkeparti kann fáa so nógva undirtøku millum manna. Og Mánadagin stóð ein rættiliga long grein í svenska blaðnum Expressen, ið viðgjørdi samráðingarnar ímillum Landsstýrið og donsku stjórnina. Eftir teirri greinini at døma hevur Landsstýrið ikki skatt umdømið hjá føroyingum, tí blaðmaðurin Lars Klint tykist ikki halda, at tað var Landsstýrið ið gjørdi sær mest fyri skommum undir samráðingunum. Tvørturímóti finst blaðmaðurin hjá Expressen at Poul Nyrup Rasmussen og skirir atburð hansara mótvegis føroyingum forhánisligan.

### Strategiskan týdning

Lars Klint vil vera við, at Danmark torir snøgt sagt ikki at spæla av við Føroyar. Sambært honum er orsøkin ikki, at danskarar vilja halda fast við ta exotisku føroysku mentanina, feskan fisk, skipstroyggjur og tílíkt. Blaðmaðurin á Expressen vísir á tann fíggjarliga og strategiska týdning, ið Føroyar og Grønland hava fyri Danmark, tá ið danska stjórnin samráðist við NATO ella EU. Eisini vísir hann á hernaðarvirksemið í Føroyum, sum føroyingar sjálvir als einki innlit hava í, eins og tað oljuríkidømi sum eftir øllum at døma finst í føroysku undirgrundini.

"Danska stjórnin letur ikki góðvilliga slíkt av hondum", staðfestir Lars Klint.

Blaðmaðurin skrivar víðari, at Danmark líka fram til Seinna heimsbardaga "uppträdde som en grym kolonialmakt" og nevnir m. a. flagg- og málstríðið. Heldur ikki í dag hava danskarar samkenslu við føroyingum, staðfestir hann:

"Tey mongu lesarabrøvini í donskum bløðum í seinastuni eru beinleiðis racistisk og kundu ómøguliga komið á prent, hevði hetta snúð seg um eitt annað land ella ein etniskan bólk við aðrari trúgv ella húðarliti", slær Lars Klint fast.

Lars Klint heldur, at Poul Nyrup Rasmussen helst hevði viljað sloppið av við føroyingar, men hann torir ikki. Tískil finnir forsætisráðharrin upp á ræðumyndir, sum skulu fáa føroyingar at sleppa dreymu-


TEY BESTU TILBOÐINI TIL KONFIRMANTARNAR

**PHILIPS Stereoanlegg**
*MZ 7 - 2 x 50 w*
• Hátalarar
• Radio
• CD
Vanl. prísur: 6.450,-
**NÚ EINANS:** 4690,00
Spar 1760,-

KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ



**Ericsson GSM fartelefon**
*T10*
• 7 ringitónar
• Vibrator
• Dual Band
**NÚ EINANS:** 1990,00



KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ

**Motorola GSM fartelefon**
*AM3180*
• Fax/data 9600 bps • SMS
**NÚ EINANS:** 945,00

**Yamaha Western Guitar**
*F310*
**Alt hetta fylgir við:**
• Taska • Reim
• Stemmufloyta
• Eyka streingir
• Streingjavindari
Vanl. prísur: 2490,-
**NÚ EINANS:** 1990,00
Spar 500,-



KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ

**JVC Boomblaster**
*RV-B99*
• CD/Bandupptakari
• Radio
• Fjarstýring
• Ljóðið yvir øllum ljóðum
**NÚ EINANS:** 2950,00



ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

petur & petur • 320870 - Fyrivarni verður tikið fyri útseldum vørum og villum.